

# HEILDARÆTLAN FYRI EYSTARA HAVNAØKI

Dagfest: 16.02.2022

Býarskipanardeildin
TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Uppskot um

# HEILDARÆTLAN FYRI EYSTARA HAVNAØKI

Dagfest: 21.02.2022

Býarskipanardeildin

forsíðumynd: Ólavur Fredriksen / Faroephoto

# Innihaldsyvirlit


**1.0 Inngangur . . . 1**
- 1.1 Endamálsorðing . . . 1
- 1.2 Eystara Havnaøki . . . 1
  - 1.2.2 Søguslóð og samleiki . . . 2
  - 1.2.3 Verandi støða . . . 4
- 1.3 Samtíð og framtíð . . . 6
  - 1.3.2 Verandi ætlanir í økinum . . . 6
  - 1.3.3 Eystara bryggja tømist . . . 7

**2.0 Grundarlagið undir nýggju heildarætlanini . . . 8**
- 2.1 Tilgongd . . . 8
- 2.2 Málsetningar og niðurstøður . . . 10

**3.0 Heildarætlan fyri Eystara havnaøki . . . 12**
- 3.1 Hugsjón . . . 12
  - 3.1.2 Virkisfunktiónir . . . 13
  - 3.1.3 Bryggjan í býnum . . . 14
  - 3.1.4 Ásir og meginlinjur . . . 15
- 3.2 Skipan av økinum . . . 16
- 3.3 Økispartar og byggiskali . . . 17
- 3.4 Ferðslurensl . . . 18
- 3.5 Yvirlits støðumynd . . . 20
- 3.6 Prinsippskurðir . . . 21

**4.0 Átaksøkini í heildarætlanini . . . 22**
- 4.1 Átaksøki A (Miðsavnan og mentan) . . . 24
  - 4.1.2 Smyril og verandi farstøð. . . . 24
- 4.2 Átaksøki B (Blandað parkeringsøki) . . . 26
- 4.3 Átaksøki C (smábýlingur og tún) . . . 28
- 4.4 Átaksøki D (ferðamiðstøð og uppihald) . . . 30
- 4.5 Átaksøki E og F (Broytt atkomuviðurskifti) . . . 32
- 4.6 Átaksøki G og H (Bryggjutorg og smábátahavn) . . . 34



Linoskurður av Eystaru bryggju. (1962)
*Janus kamban*

# 1.0 Inngangur

## 1.1 Endamálsorðing

Endamálið við hesum skrivi er at leggja ein kós fyri hvussu Eystara havnaøki, frá Kongabrúnnið og út til Havnaskrivstovuna kann mennast næstu 30 árini. Heldur enn at vera ein læst økisætlan, skal hetta skjalið síggjast sum eitt arbeiðsamboð, ið uppstrikar eitt úrval av brúksmøguleikum fyri økið, umframt eina átaksætlan við eini leysari vegleiðandi átaksraðfylgju.

## 1.2 Eystara Havnaøki

Eystara havnaøki er í núverandi støðu eitt serstakliga samansett býarøki, har eitt nú elstu og mest varðveitingarverdu partarnir av býnum leggja seg tætt upp at mest samferðslutekniska og ídnaðarvirknasta økinum í býnum.

Áhugabólkarnir, sum í núverðandi støðu hava sítt dagliga virksemi í økinum, seta harumframt eisini sín serstaka dám á økið, bæði tá hugsað verður um hvussu ymisku økispartarnir fyrihalda seg til hvønn annan, og hvussu økið í síni funktiónsuppdeiling fyriheldur seg til restina av býnum. Eitt nú er Eystara havnaøki, hóast sentralu staðsetingina, merkt av fyrst og fremst at vera eitt samferðslutekniskt og býarskipanarliga avbyrgt øki í dag.

Komandi árini verða fortreytirnar fyri virkseminum á Eystara Havnaøki tó somikið broyttar, at neyðugt er at nýskipa økið, so tað kann gagnnýtast á ein skynsaman og framtíðartryggjaðan hátt.

Alstórur tørvur hevur tískil verið á eini heildarætlan fyri økið millum Kongabrúnna og út til ídnaðarmolan á Eystara havnaøki.



### 1.2.2 Søguslóð og samleiki

Tað, sum eyðmerkir høvuðsstaðin, og sum navnið Tórs*havn* eisini sipar til, er at vit búleikast í einum sjóbundnum umhvøvi, á markamótinum millum land og hav.

At lív er lagað her á landi, er ósvitaliga treytað av at fólkið er og hevur verið sera tætt knýtt at sjónum. Tjóðarsøga okkara er í stórum brøgdum sett saman av hendingum og útlitum, ið eru heft at sjónum so ella so. Tað er her at stórur partur av virkseminum er, og tað er her at fólk hittast.

Ein hin søguliga ríkasti bletturin, ið vit vita um í býnum er allarhelst Eystara vág og Tinganes, ið hevur verið karmur um mangar handingar og broytingar ígjøgnum ár og dag.








Fríðrikur 8. kongur og Christian 10. krúnprinsur koma í land á Kongabrúgví 25. juli í 1907
Mynd Søvn Landsins

**1.2.3 Verandi støða**

Í dag kenna vit Eystaru bryggju sum eitt havnatekniskt øki, ið mestsum avbyrgir seg frá býnum hóast økið liggur beint upp at miðbýnum, landsins hægsta embætissæti, og elsta og ivaleyst mest eyðkenda býlinginum í býnum, nevniliga býlinginum á Reyni. Fyri endan á økinum stendur Skansin avskorðin og fjarur í býarmyndini.

Hóast tætta atknýtið til miðbýin, er hetta í verandi støðu ikki ein býarpartur, ið bjóðar inn til uppihald og gonguferðslu, men heldur tvørturímóti er hetta ein staður, ið ber brá av fyribilsloysnum, tómum asfaltsfløtum, eini torgreiddari økisskipan og vandamiklum gonguferðslumynstri fyri ferðafólk við bussi ella skipi, ið uppliva Eystaru bryggju sum innkomuportrið til Tórshavnar bý.










Verandi støða við Bursatanga

## 1.3 Samtíð og framtíð

### 1.3.2 Verandi ætlanir í økinum

Sum ein liður í ætlanini um at effektivisera og nýskipa Eystara havnarøki, hevur Tórshavnar Havn lagt eina ætlan fyri hvussu tekniski parturin av havnarlagnum kann skipast framyvir.
Hetta er ein ætlan, ið fyrst og fremst leggur dent á atløguviðurskifti, logistikk og ferðsluleiðir hjá ferðafólki í bili og farmi, sum er beinleiðis knýtt at tekniska virkseminum í økinum.

Høvuðslutirnir í ætlanini eru, at farmaflutnings-virksemið hjá Faroe ship og Smyril Line Cargo, sum seinastu mongu árini hevur ligið á Eystaru bryggju ímillum Farstøðina og Havnarskrivstovuna á Eystaru bryggju 30 skal flytast út á molan, har rúmligari er at virka.

Skrivstovuhølini, ið TAKS hevur nýtt á Eystaru bryggju 30 verða eisini niðurtikin, sambært ætlanini.

Alt virksemið hjá Smyril-line, verður somuleiðis flutt longur út, har sáttmáli er gjørdur um at byggja eitt nýtt pakkhús og ferðafólkaterminal, sum verður bygdur sambært teimum krøvum og treytum, sum eru galdandi hesum viðvíkjandi. Herundi m.a. millumtjóðaásáttmálar og reglugerðir sum SOLAS og ISPS, sum altjóða felagskapurin IMO setir fyri Schengen havnarøkir við ferðafólka- og farmaflutningi millum lond.

MS Norrøna kemur sostatt framyvir at leggja at við bryggjukneysan undir Hvanaskrivstovuni og inni í ytra hyli á ídnaðarmolanum (alt eftir veðri), har trygdargirðing verður sett kring teirra virksemi.

Millum verandi farstøð og Havnaskrivstovuna verður tørvur á einum leysliga mettum víddarmáli av sokallaðum “buffara-øki” til uttanlandasiglingina. Hetta merkir, at økið skal taka ímóti yvirskotsfarmi og bilum umborð á Norrønu um tørvur er á tí.

Hetta økið krevur ikki girðing, og eisini kann hetta sampakkast við almennu parkeringina í økinum, umframt at byggjast kann oman á økið, har buffaraøkið kann vera í grundhæddini.



### 1.3.3 Eystara bryggja tømist

Við verandi ætlanum um ein undirsjóvartunnil úr sandoynni til suðuroyar í huga, er eisini eyðsýnt at sjóvegis farleiðin av Eystaru bryggju til Tvøroyrar hevur eina avmarkaða livitíð.

Tá koyrandi verður úr sandoynni til suðuroyar, verður Smyril væntandi tikin úr sigling, og atknýtta atløguvirksemið við stóra bíðistøðuøkinum við Bursatanga verður niðurlagt.
Tá hvørki Norrøna ella Smyril leggur at her, verður ikki neyðugt við eini farstøð við landgongutorni, ið skal liggja júst á hesum staði við bryggjuna.

Innari partur av Eystaru bryggju tømist tískil so líðandi fyri virksemi, um onnur ætlan ikki fyriliggur.



## 2.1 Tilgongd

Í eini tilgongd at greina verandi- og framtíðar umstøður í økinum er greitt, at ein yvirskipað heildarætlan eigur at taka útgangsstøði í samlaða økinum, og í tí tilgongdini eigur staðsetingin av einum møguligum Tjóðleikhúsi at verða nágreinað.
Ein heildarætlanin skal fyrst og fremst taka útgangsstøði í langskygdum býarskipanarligum menningarmøguleikum og hugsandi broytingum á sjósamferðsluøkinum.

Sum liður í ætlanini at koma nærri eini dygdagóðari skipan av økinum, bjóðaði Tórshavnar Kommuna á heysti 2021 sjey undangóðkendum ráðgevara-toymum at koma við hvør sínum boði uppá eina heildarætlan fyri eitt øki, ið var avmarkað til 86.500m²
Toymini vórðu sostatt boðin at koma við eini nøktandi loysn fyri bæði skipan av økinum og eini neyvari staðseting av Tjóðleikhúsinum við Eystaru vág, sum í ein ávísan mun bygdi á staðsetingarkappingina av einum Tjóðleikhúsi í Tórshavn, sum Mentamálaráðið útskrivaði á vári í 2021, hvørs dómsnevnarúrskurður kom fram til, at eitt Tjóðleikhús átti at staðsetast við Eystaru vág.
Hugskotsinnsavningin hjá Tórshavnar kommunu varð eisini grundað á eina verkætlanarlýsing og kravfesting, sum varð orðað til tess at lýsa tær fortreytir og tær bindingar, og tey ynskir sum kommunan hevur fyri økið.

M.a. vórðu lýstar friðingar í økinum, havnateknisk krøv, og bindingar í mun til ferðslu í økinum.

Eftir at hugskotsinnsavningin varð lokað 8. november 2021, varð ein fakligur arbeiðsbólkur settur saman, mannaður av:

- Býararkitektinum í Tórshavnar Kommunu
- Atknýttum starvsfólkum frá Býarskipanardeildini.
- Býarverkfrøðinginum í Tórshavnar Kommunu,
- Havnameistaranum og verkfrøðingi frá Tórshavnar havn.
- Tveimum óheftum arkitektum/ býarplanleggjarum.
- Umboð frá Landsverki fyri verkætlanarbólkin um Tjóðleikhúsið (uttan avgerðarrætt

Arbeiðsbólkurin viðgjørdi uppskotini hvør sær, og tók støðu til býarskipanarligu og arkitektonisku dygdirnar og møguleikarnar í uppskotunum.

Tær dygdir, ið mettar vórðu at at arbeiðast kundi víðari við í tilgongdini um at røkka einum haldgóðari skipan av økinum vórðu orðaðar og settar saman í eina itøkiligt skipanaruppskot, ið varð tillagað og viðgjørt saman við nevndarumboðunum í Byggi- og býarskipanarnevndini og havnanevndini í Tórshavnar Kommunu.







Heildarætlanarøki
86.500m²

## 2.2 Málsetningar og niðurstøður

Úrskurðurin frá viðgerðini av hugskotsinnsavningini, sum fakligi arbeiðsbólkurin kom fram til, varð settur upp í fylgjandi málsetningar og niðurstøður.

- Til tess at eitt víðkað virksemi í økinum skal skipast á smidligasta hátt, er neyðugt við eini klárari funktiónsuppdeiling. Einklasta úrslitið fæst, um hetta verður skipað í ein innara og ein ytra økispart, har parturin inn ímóti miðbýnum fær ein meiri miðbýarkendan dám.

- Eitt fólksligt maritimt trivnaðarøki við torgi, kann vera trygt og vælvirkandi um bilferðslan verður lutfalsliga atskild frá gonguferðlsuni í økinum, har flestu útatvendu funktiónir eiga at leggjast.

- Til tess at tálma bilferðsluna enn meira, er best um hon verður gjørd einvegis frá Vaglinum oman í økið, og at hon í økinum ikki verður løgd í eina beina linju, og at hon harumframt verður gjørd við varieraðari gøtuálegging, og við gróðurseting framvið vegnum í støðum.

- Ymiskleiki í bygningslutfalli (skala) og er alneyðug um talan skal vera um eitt fólkisligt býarrúm til fóttgangaran. í hesum sambandi skal serligt atlit takast til nærliggjandi typologiina í Kilarakanalini, og í mun til tætta visuella sambandi við Tinganes.

- At Nólsoyarferjan leggur at lutfalsliga djúpt inni á vágnið hevur sínar fyrimunir í mun til nærleikan til miðbýin og dámin av einum hugnaligum, livandi og spennandi havnaumhvørvi, har siglt verður "inn í býin".

  Tó eigur hetta virksemið at sampakkast so tætt at eini ferðamiðstøð í økinum í so stóran mun gjøligt, tá hugsað verður um at skapa betri umstøður til ferðandi í mun til bíðirúm, ferðakunning og koyring umborð hjá bilum annars.

  At larmur frá skipi og atløgubryggju kemur at ávirka umstøðurnar hjá eitt nú einum leikhúsi í nærumhvørvinum verður ikki mett at vera ein trupulleiki upp á sikt, tá komandi skip væntandi verður heilt ella partvíst eldrivin, og stoytdoyvarar kunnu setast á rampur o.a.

- Smyril kundi verið viðvendur, til tess at fáa eina greiðligari skipan av økinum. Tað er tó ein dýr íløga at gera, um hann ikki verður liggjandi við bryggjuna her í eitt langt áramál afturat, og verður tí neyvan framd í verki.

- Ein atskild eyka ferðslubreyt um Skansan kann lætta munandi um ferðslutrýstið her.

- Uppá sikt kann byggjast á ytra bryggjuøkið undir Skansanum, eitt nú, um bygt verður oman á almenna parkering. Her kundi eitt nú verið gistingarhús, skrivstovuvirksemi, verkstaðir, ella annað leiguendamál. Illa ber til at leggja eitt nú eitt bústaðarumhvørvi her, tí her verður ov nógvur larmur frá skipum og bingjuvirksemi í økinum.

- Ein parkeringstunnil undir J.H. Schrøtersgøtu kundi givið góðar møguleikar í økinum í mun til almenna parkering, samstundis sum at útgrivna tilfarið kann nýtast á staðnum til uppfylling og útbygging ar bryggjukantum.

- Í mun til innsiglingina inn í økið, er eitt tjóðleikhús best staðsett í økinum, um tað stendur sum eitt pallsett monument á bryggjuni. Týdningarmikið er tó, at frástøðan frá Tinganesi verður vird somikið, at skalabroytingin ikki verður ov ógvuslig.

- Býarskipanarliga liggur eitt Tjóðleikhús, best um tað liggur mitt í ein togtogan ímillum at liggja sum eitt náttúrligt forleingilsi av miðbýarumhvørvinum (so tað ikki tykist ov fjart at koma til), og at vera ein skalamessiga hóskandi bygningur, ið hóskar inn í ídnaðarligu bygningstøddirnar úti í havnaumhvørvinum. (at tað ikki ger seg inn á miðbýardámin)

- Byggiskalin eigur at vera uppgangandi frá miðbýnum og út eftir bryggjuni.

- Ein endurgjørd brúgv út á Skansan antin frá gamla Skansavegnum ella frá bygningstekjum niðri á bryggjuøkinum verður heldur trupul at staðseta tí hon avmarkar hæddina á ídnaðarligu til og frákoyringina úr økinum.

- Um parkeringskjallari verður grivin niður í Eystara bryggjuøki, kemur hann lættliga somikið langt undir vatnstøðu, at her mugu pumpuskipanir setast inn. Tó er hugsandi við einum partvís niðurgrivnum parkeringskjallara niður í hálva hædd, har dekkið omaná kann nýtast til uppihald ella til at byggja á.



# 3.0 Heildarætlan fyri Eystara havnaøki

## 3.1 Hugsjón

Heildarætlanin fyri Eystara havnaøki endurknýtir eitt fólksligt og gerandisligt samband millum býin og søguliga sjóvarmálan við Eystaru vág.

Í tráð við at ídnaðarliga virksemið verður savnað undir meiri virkiligum korum longur úti á nýggju keiini, verður Eystara bryggja, frá Skansanum og inn til áarósan við Kongabrúnnað nýskipaður sum ein innbjóðandi og livandi partur av miðbýnum.

Girðingar, farmalastir og kaldar tómar asfaltsfløtur verða útskiftar við eitt nýtt fólksligt bryggjutorg, ið verður umgirt av almennum virksemi, mentan og uppihaldi, ferðavinnu, smábátahavn, handils- og kafévirksemi í einum maritimum umhvøvi, ið er halgað fótgangaranum.

Ætlaða samansetingin í økinum fer frá at vera ein avbyrgdur og óatkomiligur partur av miðbýnum, til at lata seg upp sum ein depil fyri trivnað, virsksemi og mentan í einum sólargóðum, søguliga týðandi og fólkakærum umhvørvi.

Við at menna tær dygdir í økinum, sum tryggja eitt støðugt virksemi, eru lívgandi og skapa nýggjar møguleikar, verða lunnar lagdir undir, at Eystara bryggja og alt innara havnalagið kann knýta seg upp í miðbýin.

Ætlanin verður útløgd við fyriliti fyri, at ein stigvís menning skal setast í verk, so at tað virksemið, sum skal niðurleggjast ella flytast úr økinum, verður gjørt á skilabesta hátt fyri allar atknýttu áhugapartar.

Tískil tekur henda ætlanin støði í eini menningarlinju frá verandi støðu og fram til 2050.




Verandi samanseting



↓

Ætlað samanseting 2050



### 3.1.2 Virkisfunktiónir

Heildarætlanin verður samanknýtt við fimm ymsum virkisfunktiónum, ið eru:

- Mentan og trivnaður
- Smáhandla-, matstovu og kafévirksemi
- Uppliving og ferðavinnutilboð
- Samferðslusamband og kunning
- Býareyðkenni (Tinganes & Skansin)

Hesar virkisfunktiónir verða allar mentar og knýttar hvør at aðrari í og við at tær framseta bryggjutorgið sum ein felags miðdepil í økinum.

Býareyðkenni, sum Tinganes og Skansin, ið eru lutfalsliga avskorin og fjar í býarmyndini, verða tættari knýtt upp í býin, og fáa eina nýggjan týdning og ein størri nærleika til miðbýin.

Tørvur hevur leingi verið á einum størri torgi í býnum til serligar merkisdagar, høgtíðir og hátíðarhald, har nógv fólk kann savnast á einum sólargóðum staði.

Við sínum sterka samleika og søgufesti, er tað tískil hóskandi, at innasti parturin av Eystaru bryggju, yvir av Tinganesi, verður umbygdur til eitt bryggjutorg, ið er somikið rúmligt, at her ber til at leggja sluppir, skúlaskip til og har takast kann ímóti Kongaskipinum á ein virðiligan hátt. Umframt hetta, skal tað vera somikið rúmligt, at her ber til seta sølubásar, uppdrignar kappróðrarbátar og skipa fyri tónleikatiltøkum og útisjónleiki, og har ein møgulig skoytubreyt kann uppsetast.

Sum eitt miðsavnandi býarrúm fyri alt økið, og fyri býin sum heild, verður her lagt upp til eitt størri rúmføri, og eitt annað býarskipanarligt litbrá enn t.d. Vágsbotnur hevur sum fólksligt býarrúm. Við hesum verður tá møguligt at skapa eitt fjølbroytt býarskipanarligt samskifti millum hesi bæði torgini yvir um Reyn og Tinganes, har Vágsbotnur við sínum intima dámi sum marknaðarpláss, fær eina viðbót á Eystaru vág, har størri dentur kann leggjast á eitt nú uppliving, ferðavinnutilboð, ítrótt, hátíðarhald og mentan. Hetta umhvøvið kann tá gerast eitt samleikagevandi og fevnandi innkomuportur fyri nógv, ið koma við ferðamannaskipi, bussi ella ferju.

Økið varðveitir sín leiklut sum samferðsluknarvapunktið í einum landsumfevnandi busskervi, men verður hesin parturin eisini gjørdur meira fólksligur, grønur og miðbýarkendur. At varðveita almenna samfersludepilin í heildarætlanini hevur stóran týdning fyri økið, tí hannn tryggjar ein støðugan streym av fólkaferðslu í økinum, og ein áhaldandi relevans fyri virksemið í nærumhvørvinum.

Sjóvegis sambandið til Nólsoyar spælir ein týðandi leiklut fyri økið, og verður ein ferjulega til Nólsoyar framhaldandi ein partur av býarmyndini her, hóast skotið verður upp at hon verður ment og flutt nakað, umframt at hugsast kann, at komandi skip, ið reka hesa sigling verða eldrivin og minni í vavi enn Ternan, ið rekur verandi sigling.
Ein ótíðarhóskandi og slitin farstøð skal heldur endurhugsast sum eitt livandi og áhugavert akkersfesti fyri ferðandi og ein áhugaverdur pallur fyri kunning um alskyns viðkomandi virksemi.

Tá suðuroyðarsiglingin væntandi verður niðurløgd, og Smyril-line flytir sítt virksemi longur út á molan, verður tí ikki neyðugt við einum so stórum bygningi, sum verandi Farstøð, ið stendur júst har hon stendur, eitt nú við bryggjuna, men kann hon tá flytast longur inn á eitt meiri hóskandi stað sum ein minni ferðamiðstøð við bussbásum, har ferðslan kann skipast inn og út av økium á ein smidligari hátt.

Lítil og ongin farleið sæst eftir smáu húsunum og neystabyggingini, sum var at síggja í økinum, sum fyrr varð nevnt Yviri við Trøð og Á Kák inni við Kongabrúnnað, og sum setti sín serliga dám á økið áðrenn tað var burtursprongt og umlagt til havnaídnaðarligt virksemi.
Í heildaraætlanini verður høvi at nýtulka nakað av hesum umhvørvinum sum ein nýggjan smábýling við búðum og uppihaldstúnum til ymiskt smávinnuligt virksemi. hesin smábýlingurin kann skipast sum eitt náttúrligt forleingilsi av siðbundnu sethúsabyggingini í "Kilarakanalini" í einum líkum býarrúms- og byggiskala.







Funktiónssamanseting

### 3.1.3 Bryggjan í býnum

Havnalagið í Tórshavnar býi er sum heild serliga ásjónligt í býarmyndini, og tað hevur tí alstóran týdning fyri býarmenningina sum heild, at ætlanir verða lagdar við serligum fyriliti fyri hvørjar dygdir verða skaptar. Ikki bert fyri nærumhvørvið, men eisini fyri fjarumhvørvið í býnum.

Við komandi broytingum og menning í havnaøkinum í huga, er tað tískil ráðiligt, at ein býarpartur sum Eystara bryggja verður mentur sum ein prýðiligur og dragandi partur av heildini, ið tænir nærliggjandi býareykennum sum Tinganesi og Skansanum fagurfrøðiligan heiður og tign, og knýtir tey saman í eina heild.

Eitt nú kundi eitt miðsavnandi arkitektoniskt dygdarverk í økinum til mentan og miðsavnan, sum til dømis eitt Tjóðleikhús, skapt áhuga og atdráttarmegi, og sett ein samskipaðan dám á bæði bygningar og lendi í kringliggjandi heildini.


Útsýni av Vestaru bryggju


Útsýni av Dalavegnum



Útsýni av Argjahamri

### 3.1.4 Ásir og meginlinjur

Tað hevur stóran týdning fyri skipanina av økinum, at atlit eru tikin fyri hvussu meginásir og høvuðsfarleiðir verða lagdar, og hvussu økið kann lívgast við eitt nú at eyðmerkja ella markera tey sjónligu sambond, sum longu eru í nærumhvørvinum.

Í stórum strokum liggur náttúrligi miðdepilin í økinum, har atkomuásirnar møtast. Her verður hugsað um atkomuásina oman úr býnum, oman av vegnum Yviri við Strond, og sjóvegis atkomuásina inn á vágnað.

Tað er tískil hóskandi, fyri sambindingina av økinum, at býarskipanarliga miðsavnandi funktiónir verða ætlaðar her, og at sambondini við kringliggjandi bygging verða ment sum atkomiligar farleiðir við stuðlandi og áhugaverdum virksemi.

Týðandi siktilinjurnar í økinum eyðmerkja og samanknýta sjónligu sambondini í økinum, og eru samleikamennandi fyri økið sum heild.

Her verður eitt nú hugsað um sjónliga sambandið:

- millum Skansan og Tinganes.
- millum Kongabrúnnað og Skansan
- Millum Kilarakanalina og bryggjuna
- av Skansagøtu yvir á Reyn og Tinganes
- frá omankoyringini við Skansan og út á Tinganes
- frá rundkoyringini og niðan á kirkjutornið á Havnar kirkju.



Atkomuásir og spenningsfelt



Siktilinjur í økinum

## 3.2 Skipan av økinum

Við nýggju bingjuhavnsútbyggingini er alt Eystara havnaøki er tilsamans umleið 190.000m²

Farmur, bingjuvirksemi, millumlanda-ferðafólkaflutningur og annað virksemi, ið krevur ISPS trygdargirðingar er, og verður við tíðini flutt út og savnað á einum stað á útbygda molanum, og kann virka ótarnað her í einum skipaðum ídnaðarumhvørvi.

Hetta merkir, at tómligari verður í innara endanum á Eystaru bryggju, serstakliga tá hugsað verður um at Smyril væntandi verður tikin úr sigling so skjótt sum tað verður koyrandi til Suðuroyar.

Mett verður, sostatt, at 23.500m² av økinum á Eystaru bryggju hava lutvíst tørv á at gagnnýtast á ein meiri skynsaman hátt, tí virksemið her antin verður niðurlagt, bygningar eru slitnir og ótíðarhóskandi, ella tí at funktionellu fortreytirnar í økinum eru í broyting.

Møguleiki er tí fyri, at hesir 23.500m² kunnu nýskipast, sum ein aktivur partur av kringliggjandi miðbýarumhvørvinum við sjóvarmálan í Tórshavn.

Markamótið millum ídnaðarliga havnavirksemið og miðbýarvirksemið er sett miðskeiðis á Eystaru bryggju tí neyðugt er við einum sokallaðum "buffaraøki", ið kann nýtast til antin ídnaðarligt virksemi ella sum eyka bíðistøðupláss umborð á millumlandaferjuna, um plásstrot verður longur úti á keiini.

Her krevst ikki girðing, og talan er tískil um eitt mark við einum ávísum yvirlappi, har ídnaðarligt og alment virksemi kunnu umskara hvørt annað, og har bíðistøðupláss eitt nú kunnu verða ein partur av eini almennari parkeringsskipan.

Funktiónsuppbýting fyri Eystara havnaøki



## 3.3 Økispartar og byggiskali

Heildarætlanin deilir umtalaða økið í fýra økispartar.

- Økispartur 1, ið er økið við ósan á Havnará og nakað út á Kongabrúgv (umleið 1300m2).
- Økispartur 2 er innara bryggjuøkið frá Kongabrúnni og út til verandi farstøð. (umleið 17.000m2)
- Økispartur 3 er Miðøkið við verandi farstøð og atknýttum bussstøðubásum, tolli og parkering. (umleið 7600m2)
- Økispartur 3 er ytra bryggjuøkið frá verandi farstøð og út til ídnaðarmolan. (umleið 7000m2).
- Uttanfyri økispart 4 er Schengen- og ídnaðarøki. Hetta økið verður ikki umrøtt í hesi heildarætlanini.

Heildarætlanin er skipað so, at:

*Økispartur 1 og 2* verður umskipaður til miðbýarkent útatvent virksemi við smáhandlum, kafé/matstovum, blandað ferðavinnuligt endamál, torg og smábátahavn.

Býarrúmini her venda sær til bleyta súkklandi og gangandi ferðslu og uppihald millum bygningarnar í túnum, smogum og krókum. Byggiskalin her lágur í 1. til 2. hæddum. Longri úti á økisparti 2 verður dentur eisini lagdur á størri almennar funktiónir, sum skulu síggjast við størri frástøðu, sum eitt nú ferðamiðstøð og kunningarstova. Her verður býarrúmsdenturin lagdur á at lættliga finna veg ígjøgnum økið.

Byggingin her verður loyvd upp til 4. hæddir.

*Økispartur 3* verður avsettur til alment mentanarligt endamál, so sum leikhús og almenna parkering.

Hesin økisparturin og leggur seg upp ímóti høga hamarsgrótinum á Skansanum. Økið er ásjónligt frá stórum avstandi aðrastaðni úr býnum, og er ikki í vanda fyri at taka útsýni ella sólarljós frá bústaðarøkjum ella týðandi býarrúmum. Tískil er hóskandi, at her verður hægri bygging loyvd í upp til 5 hæddum, og undantak kann í serligum føri verða givið upp til 20 m frá bryggjukanti.

*Økispartur 4* verður skipaður, lutvíst sum sokallað buffara-øki til uttanlandasiglingina og atløgubryggjuni hjá Norrønu/SmyrilLine. Og lutvíst sum almenn parkering á Eystaru bryggju annars.

Her kann byggjast í upp til 5 hæddum, treytað av at ikki verður bygt upp um hæddina á hamaranum á Skansanum, ið er 16m høgur í lutfalli til bryggjukantin.

Í øki 2 og 3 eru líkindini góð fyri at ymsar funktiónir umskara, ella yvirlappa, hvørja aðra. Til dømis er hugsandi at buffarastøðubásar til ferjulegurnar partvís kunnu nýtast sum almenn parkering um kvøldarnar, tá tiltøk eru á skránni í økinum.

Eisini er hugsandi at parkeringsdekk kann byggjast, um tørvurin og trýstið á hetta økið fer at vaksa.



Byggilistarligur skali




## 3.4 Ferðslurensl

- Tung ferðsla
- Samferðslurensl
- Bilferðslurensl
- Bleytt ferðslurensl

**Ferðsluskipan /Heildarætlan fyri Eystara havnaøki**

FS_01 Yvirlitsstøðumynd A / 1:1000 / A2

TÓRSHAVNAR KOMMUNA Býarskipanardeildin - 17.02.2022

## Tung ferðsla



Tunga ferðslan út á ídnaðarkeiina fær eitt serskilt vegspor til smidliga frákoyring um Skansan. Norðanfyri Skansan verður ein flættiskipan áðrenn vegurin smælkar aftur.

## Bussleið



Bussferðslan fær eitt smidligari rensl tá øll viðkomandi ferðsla verður leidd oman í eina nýggja ferðamiðstøð. Eisini fær Býarbussurin eitt fast pláss við ferðamiðstøðina.

## Bilferðsla



Vanliga miðbýarferðslan verður tálmað nakað við at vegurin oman í økið av Áarvegnum verður einvegis

## Gonguleiðir



Bleyta ferðslan í økinum verður leidd burtur frá bilvegnum har tað ber til.


HEILDARÆTLANARØKI
Skansin
Café / savn
Flættilopan
Rund
koyring
Ø22m
Grønt øki
Frákoyring eyka vegspor
SEV
koblingarstøð
Handils- & mátstovu-
virksemi
Ferðamiðstøð
Kunningarstova
Almenn parkering
minst 40 p-pláss
Almenn parkering &
Buffara-støðupláss til
uttanlandasigling
Byarbussur
Bygdaleiðir
støðubásar
Havnargøta við grønum skilageira og gróðurseting
Skansavegur
Almenn parkering
45 p-pláss
Skurður
Kongabrúgv
Átaksøki C
fyrrv. farstøð
Tjóðleikhús
Byggiøki 4000m²
Tjóðleikhús
Kappingarøki 7.600m²
Eyka goymsluøki
uttanlandasigling
Havna-
skrivstova
ISPS girðing
Útatvent alment
virksemi
Útatvent alment
virksemi
Kilarakanalin
Túr / Smábúðir
Avsetingarøki
Einvegis ferðsla
Bryggjutorg
4000m²
Útbygdur bryggjukantur
Uppskot
Skurður
Miðøki - Átaksøki A
Kongabrúgvin
Bátaskúrðar
Siðferðabøking & skúla-
tilboð
NÓLSOYARFERJA
Ólavsøkudrátur
Kongaskip / Skúlaskip
Erling Jals gøta
Kopargøta
Áarvegur
Einvegis ferðsla
Bringsnargøta
Uppihald
áarosin
pop-up støðupláss
Keiin við
Bursatanga
Smábátaarmar
heftir eystarumegin
Nýggjur
smábátaarmur
Undir Kjallara
EYSTARA VÁG
NORRØNA
Altjóða
Terminalur
Smyril Line
Skurður
Tinganes - Átaksøki D
3.5 Yvirlits
støðumynd
Tung ferðsla
Samferðslurensl
Bilferðslurensl
Bleytt ferðslurensl
0
10
25
50
100m
Heildarætlan fyri Eystara havnaøki
PSB_03
Yvirlitsstøðumynd A / 1:1000 / A2
TÓRSHAVNAR KOMMUNA
Býarskipanardeildin - 17.02.2022

# 3.6 Prinsippskurðir

## Prinsippskurður - Átaksøki C

Bygningshæddir




## Prinsippskurður Átaksøki D

Bygningshæddir




## Prinsippskurður - Átaksøki A

Bygningshæddir



# 4.0 Átaksøkini í heildarætlanini

Átaksøkini í ætlanini gera tað lættari at skipa ymisk inntriv og temu í mun til hvønn annan í heildini.

Bókstavaraðfylgjan A,B,C,D,E,F,G og H kann skiljast sum ein vegleiðandi leyslig átaksraðfylgja, har fyrst verður farið undir at fyrireika A, sum síðani ger tað møguligt, at fara undir átaksøki B osv.

Tá virksemið í Eystara havnaøki illa kann niðurleggjast meðan arbeitt verður, ber ikki til at raðfesta tilvildarliga ella at arbeiða við øllum økinum í senn, og tí er neyðugt við eini skipaðari raðfylgju fyri tey inntriv, sum skulu gerast í økið.

Tað, sum til ber at niðurleggja ella flyta fyrst, verður tískil stýrandi í mun til hvussu arbeiðsætlanin verður løgd, og hvørji átøk kunnu raðfestast.

Fyrivarni skal tó takast fyri, at raðfestingin, sum er lýst í hesum skjali kann broytast alt eftir tørvi.

Eitt dømi um hetta, eru viðurskiftini við suðuroyarsiglingini. Tað hevur til dømis alstóran týdning fyri heildarætlanina uppá sikt, at Suðuroyarsiglingin verður niðurløgd, so stórur partur av økinum kann umskipast frá bíðistøðuplássum, farmaleiðum og ferjulegu til eitt nú torg, útbygda bryggjupromenadu og nýggja bussmiðstøð.

Men fram til at tað gerst veruleiki, eiga fyrireikingar og stigvís byggiátøk tó at gerast.

Átaksøki A, er merkt av, at serlig atlit mugu takast til hvussu samskipast kann í mestan mun við tey kringliggjandi átaksøkini.

Tí hongur ein nágreiniligari skipan av átaksøki A ósvitaliga saman við hvussu funktións- og býarrúmssamskipanin kann háttast við eitt nú eitt bryggjutorg í átaksøki G, atkomuleiðir til ferðamiðstøðina í átaksøki D, og Innkoyring og almennar parkeringsmøguleikar í átaksøki B.

Nágreiningin av átaksøki A má tí taka serlig fyrilit fyri hesi heildini.


A
B
C
D
E
F
G
H
0
10
25
50
100m

## 4.1 Átaksøki A (Miðsavnan og mentan)

Sum tað fyrsta kann farast undir at fyrireika Átaksøki A.

Grundað á, at økið liggur væl fyri í mun til útsýni, sólargang, frástøðu frá vanligari bústaðarbygging góða sjónsambandi úr einum stórum parti av býnum, skal økið gagnnýtast sum kappingarøki til ein av meginbygningunum í økinum.

Økið skal vera karmur um mentan, undirhald og uppihald umframt almenna parkering í einum grønum dámi.

Her kann ein ein nágreiniligari ætlan leggjast fyri hvussu bygningurin kemur at taka seg út í økinum, treytað av, at bygt verður innanfyri innteknaða byggiøkið, sum er 4000m² til støddar.

Um hetta verður gjørt sum eitt nú arkitektakapping, skal eitt víðkað kappingarøkið nágreinast í verkætlanini, sum fevnir um ALT átaktøki A, ið fevnir um góðar 7600m². Her skulu serlig atlit takast til samskipanarmøguleikarnar við kringliggjandi funktiónir, og hvussu hesi átaksøki møguliga kunnu broytast til tess at eitt betri heildarúrslit kann røkkast, býarskipanarliga.

Sum dømi um hetta kann nevnast, at á markamótinum millum Átaksøki A og bryggjutorgið (Átaksøki G), skal ein ætlan leggjast fyri hvussu yvirgongdin verður skipað, og hvussu hesi bæði økini kunnu seta dám á hvørt annað í samanrenningini millum býarrúm og bygning. í hesum sama viðfangi eigur ein ætlan tískil at leggjast fyri hvussu bryggjukantar kunnu útbyggjast í økinum og hvussu samlaða økið kann nýtast til ymisk endamál og ymsar tíðir á árinum, eitt nú tá Ólavsøka er.

Hetta sama er galdandi fyri markamótið millum átaksøki A og D, har átaksøki D er ætlað sum karmur um nýggja bussmiðstøð, kunningarstovu, alment uppihald og parkering og annað blandað virksemi.
Og markamótið millum A og B (sum sokallað buffaraøki til farm og bíðistøðupláss til uttanlandasiglingina hjá Norrønu/SmyrilLine) har møguleikar skulu útgreinast í mun til hvussu hesi bæði økini kunnu deila funktiónir sum t.d. almenna parkering.

### 4.1.2 Smyril og verandi farstøð

Týdningarmikið er, at fyrilit verða tikin fyri stigvísari økisfyrireiking fyri átaksøki A.

Avbjóðingarnar eru:

- Verandi farstøð skal antin hýsast fyribils á øðrum staði í nærumhvørvinum, ella endurbyggjast sum ein varandi loysn í átaksøki D
- Smyril verður liggjandi við verandi atløgu á Eystaru bryggju á eitt ávíst áramál afturat, og skal atløgan her nýtast sum ein aktivt tekniskt havnaøki, har neyðugt er við 14m av frástøðu frá bryggjukanti inn til byggiøki til farmaflutning aftur og fram eftir bryggjuni.

Stigvíst kann hetta skipast soleiðis:

1. Arkitektakappingin verður útskrivað, har avsetta byggiøkið er 4000m² í grundmáli, treytað av at kappingarøkið nágreinar hvussu alt átaksøki A (á umleið 7600m²) skal skipast upp ímóti kringliggjandi økisætlanum.
2. Fyrireikingar verða gjørdar til hvussu farstøðin kann hýsast ella byggjast á øðrum staði í nærumhvørvinum, og virksemið verður hareftir flutt.
3. Farast kann undir at byggja á avsetta byggiøkinum í Átaksøki A, tó við eini 14m frástøðu frá bryggjukanti.
4. Tunnilin til suðuroyar verður tikin í nýtslu, og Smyril verður tikin úr sigling.
   Byggjast kann nú á øllum økinum, og bryggjukantar kunnu útbyggjast og tillagast.

**Fram til at Smyril verður tikin úr sigling**




Atlit skulu takast fyri, at reyða økið verður í nýtslu sum atløgubryggja til Smyril, møguliga til at hann tikin úr sigling.

**Smyril tikin úr sigling**




Alt økið kann gagnnýtast til ætlaða virksemið, og bryggjukantar kunnu útbyggjast eftir mettum tørvi


D
A
B
G

## **4.2 Átaksøki B** (Blandað parkeringsøki)

Virksemið, sum í verandi støðu er í hallarbygninginum á Eystaru bryggju 20, og í skrivstovubygninginum á Eystaru bryggju 30, verður eftir ætlan flutt, og bygningarnir niðurtiknir.

Hetta økið verður tá skipað, lutvíst sum sokallað buffara-øki til uttanlandasiglingina og atløgubryggjuni hjá Norrønu/SmyrilLine, og lutvíst sum almenn parkering á Eystaru bryggju annars.

Her kann byggjast í upp til 5 hæddum, treytað av at ikki verður bygt upp um hæddina á skansatromini, ið er 16m høg í lutfalli til bryggjukantin.

Í øki 3 og 4 eru líkindini góð fyri at ymsar funktiónir umskara, ella yvirlappa, hvørja aðra. Til dømis er hugsandi at buffarastøðubásar til ferjulegurnar partvís kunnu nýtast sum almenn parkering um kvøldarnar, tá tiltøk eru á skránni í økinum.

Eisini er hugsandi at parkeringsdekk kann byggjast, um tørvurin og trýstið á hetta økið fer at vaksa.

Prinsippskurður - Økispartur 4

Bygningshæddir




B
Prinsippskurður
økispartur 4

## 4.3 **Átaksøki C** (smábýlingur og tún)

Vegurin oman í Havnaøkið verður einsrættaður og lagdur eitt vet vestur eftir, so at ein beinleiðis ás verður týðilig út á ætlaða bryggjutorgið í økinum. Innanfyri verður ein smábýlingur við smogum og túnum og smávinnubúðum, ið skapar eitt samband úr havnaøkinum niðan í Kilarakanalina.

Sólfagri bletturin undir Skansavegnum verður sostatt ikki bert til eitt útsýnis og uppihaldsstað, men verður víðkaður til eitt hugnaligt steinsett bilfrítt tún við smogum smáum kaféum, listasýnisgluggum og sølubúðum.

Smábýlingurin verður settur við smáum húsum í neystastødd í einari hædd, ið bæði gevur høvi til afturhvarv til tá sermerkta eyðkennið við økinum við áarósan vóru tey mongu smáu neystini, sum stóðu her.

Sum greitt er áður, er loyvda bygihæddin her lág í 1. til 2. hæddum.



Dømi um húsatypologi í Átaksøki C



Býlingurin við Kongabrúnnað fyrst í farnu øld.

Prinsippskurður - Átaksøki C

Bygningshæddir




Prinsippskurður
Átaksøki 1
C
Tún / Smábúðir
Einvegis ferðsla
Kongabrúgvin
Bryggjutorg
4000m²
Erling Jals gøta
Kopargøta
Áarvegur
Einvegis ferðsla
Uppihald
áarósin
pop-up støðupláss
Undir Kjallara

## 4.4 **Átaksøki D** (ferðamiðstøð og uppihald)

Økispartur D verður skipaður sum samferðsludepilin í økinum, sum knýtir økið beinleiðis í busskervið til alt landið, umframt at hetta økið skal brynjast til at taka ímóti, og víðaribeina ferðafólk, ið antin koma við bussi av flogvøllinum til havnar, ella av ferðafólkaskipi.

Tá Smyril verður tikin úr sigling, verður gamla farstøðin nýhugsað inn í hetta økið sum ein ferðamiðstøð við einum útbygdum bussterminali, ið fevnir um eina víðkaða bussskipan við býarbussi og bygdaleiðum til eitt nú Sandoynna og Suðuroynna.

Her er tískil upplagt at hava eitt miðsavnandi knarvapunkt fyri ferðandi, ið leggur dent á at veita góða kunning og leiðbeining til ferðandi, føroyingar, sum fremmand.

Miðskeiðis á økinum verður almenn parkering til á leið 45 bilar, ið er ætlað øllum økisparti 2, frá verandi farstøð og inn til Kongabrúnnað.

Dentur verður eisini lagdur á útvenda virksemið til bryggjutorgið, her funktiónir, sum kafévirksemi og annað alment miðbýarvirksemi kann leggjast.

Byggingin her, skal síggjast við størri frástøðu tá talan er um eitt nú ferðamiðstøð og kunningarstova, umframt at bergið undir Skansavegnum er upp til 16 m høgt her.

Byggingin her verður tí loyvd upp til 4. hæddir.



Tilgjørd mynd: Zeta Architects

Prinsippskurður Átaksøki D

Bygningshæddir






**Ferðsluskipan /Heildarætlan fyri Eystara havnaøki**

FS_01 Yvirlitsstøðumynd A / 1:1000 / A2

TÓRSHAVNAR KOMMUNA Býarskipanardeildin - 17.02.2022

## 4.5 **Átaksøki E og F** (Broytt atkomu-viðurskifti)

Hvat áaksøki E viðvíkur, verður meginrundkoyringin í økinum víðkað munandi til at vera minst 22m í tvørmáti, so hon smidligari kann avgreiða tunga ferðslu. Henda Nýggja rundkoyringin verður løgd longur oman, og fær ein nýggjan arm beint oman miðøkið, ið verður mentanardepilin í økinum.

Vegurin frá rundkoyringini og út á ídnaðarøkið verður breiðkaður við eini eyka frákoyringarbreyt til tunga ferðslu niðan um Skansan. Her verða so statt tríggjar breytir. Bygdaleiðir og býbussurin kann eisini nýta ytra vegaspor.

Omanfyri Skansan smælkar vegurin aftur, og her verður ein flættiskipan.

Átaksøki F verður bilfrítt, undantikið privatari og ørindakoyring út á Reyn, undir Kjallara og út á Tinganes.

Her verður dentur lagdur á uppihald og gonguferðslu, har møguleiki verður at seta pop-up sølubásar og matvøruvognar.




**Ferðsluskipan /Heildarætlan fyri Eystara havnaøki**

| | |
|---|---|
| FS_01 | Yvirlitsstøðumynd A / 1:1000 / A2 |
| TÓRSHAVNAR KOMMUNA | Býarskipanardeildin - 17.02.2022 |

## 4.6 **Átaksøki G og H** (Bryggjutorg og smábátahavn)

Í átaksøki G verður nýtt bryggjutorg lagt við góðum 4000² beint yvir av Tinganesi.

Torgið verður útgjørt við breiðum bátadrátti til kappróðursbátar á ólavsøku, bryggjukanti til størri stuttleikafør, seglskip, skúlaskip og drotningaskip, um framt at her eisini vera atløguinvik til bátar til skúlaflokkar og sjógangangi ferðavinnutilboð. Bryggjukanturin framvið torginum verður timburklæddur og útgjørdur til havnapromenadu framvið sjóvarmálanum.
Eisini verður pláss her fyri eini innbygdari skoytubreyt á vetri, umframt at her eru rúm fyri at skipa fyri størri tiltøkum sum tildømis útisjónleiki og tónleikatiltøkum, temadøgum.

Átaksøki H fevnir um eina útbygda smábátahavn. Tá keiin við Bursatanga er stytt, ber til at leggja ein nýggjan arm til smábátar út her fyri at vaksa um bátaplássini í økinum.
Bátaarmarnir verða viðvendir, so teir verða festir í bryggjuøkið og kongabrúnna, so teir verða meira atkomiligir.

Eisini verður rúm her fyri at gera smærri bátaskúrar til ymiskan reiðskap.

Ólavsøkuhátíðarhald



Uppihald og havnapromenada



Kongavitjan





útisjónleikur og temadagar



Sjógangandi ferðavinna



Skoytubreyt



Útatvent alment virksemi
Útatvent alment virksemi
Tjóðleikhús
Byggiøki 4000m²
Avsetingarøki
Tún / Smábúðir
Einvegis ferðsla
Kongabrúgvin
Bátaskúrðar
Sjóferðabóking & skúla-tilboð
G
Bryggjutorg
4000m²
NÓLSOYARFERJA
Ólavsøkudráttur
Kongaskip / Skúlaskip
Erling Jals gøta
Kopargøta
Áarvegur
Einvegis ferðsla
Uppihald áarósin
pop-up støðupláss
H
Undir Kjallara
Nýggjur smábátaarmur

Býarskipanardeildin

Dagfest: 21.02.2022




## Yvirlits støðumynd

| | |
|---|---|
| Tjóðleikhús Byggiøki | Tung ferðsla |
| Tjóðleikhús Kappingarøki | Samferðslurensl |
| | Bilferðslurensl |
| | Bleytt ferðslurensl |

**Heildarætlan fyri Eystara havnaøki**

PSB_03 — Yvirlitsstøðumynd A / 1:1000 / A2

TÓRSHAVNAR KOMMUNA — Býarskipanardeildin - 17.02.2022